UTTAN ÚR HEIMI



# Hava ikki rætt til ein verja

**Útlendingar, sum sita fangar í Guantanamo, hava ikki rætt til at hava ein verja hjá sær, tá avgerast skal, um teir skulu latast leysir ella verða sitandi í fangaleguni.**

FANGAR
*Árni Joensen*
*fartekst@mail.dk*

Amerikanska verjumálaráðið Pentagon kunngjørdi í gjár, at útlendingarnir í Guantamamo-fangaleguni kunnu fáa stuðul frá einum embætismanni hjá verjumálaráðnum, men teir hava ikki rætt til at hava ein verja hjá sær, tá avgerð skal takast um, hvørt teir skulu latast leysir ella verða sitandi í leguni.

Myndugleikarnir í teimum londunum, sum fangarnir eru úr, fáa heldur ikki atgongd til rættarhølið, har avgerðin verður tikin, men teir kunnu senda amerikonsku myndugleikunum eitt skriv um fangan og støðu hansara, skrivar Reuters.

Pentagon sigur, at viðurskiftini hjá teimum einstøku fangunum verða viðgjørd hvør sær, og tað fekk í gjár mannarættindafelagsskapin Human Rights Watch at siga, at USA ætlar at hava teir flestu fangarnar sitandi í Guantanamo í fleiri ár.

Sambært amerikonsku myndugleikunum eru umleið 640 fangar í Guantanamo-leguni.

# Milliónir hava ov lítið at eta

**Í 38 londum er mattrot, og í Afrika hava fleiri milliónir ov lítið at eta**

MATTROT
*Árni Joensen*
*fartekst@mail.dk*

Turkur, eyðkvæmi og vápnaðar ósemjur hava elvt til mattrot í helminginum av teimum afrikonsku londunum. Tað stendur í einari nýggjari frágreiðing hjá ST-matvørustovninum FAO.

Í frágreiðingini verður sagt, at fólk í 38 londum kring heimin hava ov lítið til matna. 24 av hesum londunum eru í Afrika, sjey í Asia og fimm í Latínamerika. Men Evropa er eisini í yvirlitinum, tí sambært FAO hava fólk í Kekenia og Serbia-Montenegro heldur ikki nóg mikið til matna.

Áhaldandi turkur í pørtum av Afrika hevur gjørt, at 7,2 milliónir fólk í Etiopia og 3,6 milliónir fólk í Sudan líða av mattroti. Í Eritrea fáa 1,9 millión fólk ov lítið at eta, og tað sama er galdandi fyri meiri enn tríggjar milliónir fólk í Tanzania og Uganda, 1,2 millión í Kenya og 580.000 fólk í Somalia, sigur FAO.

# Vandi fyri borgarakríggi í Irak

**Arabiskir eygleiðarar vænta, at harðskapurin í Irak teir seinastu dagarnar fer at halda fram, og at vandin fyri borgarakríggi veksur í hvørjum**

IRAK
*Árni Joensen*
*fartekst@mail.dk*

Enn hava tey blóðugu bumbuálopini á teir iraksku shiamuslimarnar seinasta týsdag ikki elvt til hevndarálop, og teir fremstu leiðararnir hjá shiamuslimunum hava mælt sínum viðhaldsfólki til at vísa hógv.

Men arabiskir eygleiðarar eru alt annað enn sannførdir um, at tað verður so. Teir siga seg hava sæð fleiri tekin til, at harðskapurin fer at vinda upp á seg, og at tað kann enda við einum veruligum borgarakríggi. Millum annað vísa teir á, at USA ætlar at taka sínar hermenn úr fleiri býum og at lata irakskar løgreglumenn taka við eftirlitinum. Eitt sera vandamikið stig siga teir arabisku eygleiðararnir.

Shiamuslimski leiðarin ayatollah Hadi al Muddaresi segði í gjár, at tað vóru víðgongdir sunnimuslimar, sum skipaðu fyri atsóknunum týsdagin, og at teirra mál er at elva til borgarakríggj. Menn hann vissaði umheimin um, at shiamuslimarnir fara ikki upp í eitt nýtt stríð.

Mustafa Elwy Seif, sum er professari á lærda amerikanska háskúlanum í Kairo, sigur, at amerikanska avgerðin at taka hermeninar úr summum irakskum býum kann gerast júst tað stigið, sum kann enda við einum borgarakríggi.

– Verða teir amerikonsku hermenninir tiknir úr teimum sunnimuslimsku býunum, kann tað hava við sær, at shiamuslimarnir fara inn í býirnar fyri at tryggja lóg og landaskil. Tað fer at økja spenningin ímillum sunnimuslimar og shiamuslimar og kann enda við borgarakríggi, sigur tann egyptiski professarin.

## Vænta sær valdið

Sjálvur roknar hann við, at teir shiamuslimsku leiðararnir royna at fáa shiamuslimarnar at halda sær í skinninum, tí teir vænta at fáa valdið í Irak, tá val verður. Shiamuslimarnir eru 60 prosent av irakska fólkinum. Men skuldi tað hent, at amerikanska hersetingin verður ov drúgv, ella at tann demokratiska skipanin ikki gevur shiamuslimunum tað vald, teir vænta at fáa, kan myndin skjótt broytast, sigur Mustafa Elwy Seif, professari.

Ein annar viðurkendur arabiskur eygleiðari, Ahmad Yusef Ahmad, sum er stjóri á arabiska mentanarstovninum í Kairo, heldur eisini, at vandin fyri borgarakríggi í Irak er stórur. Hann stúrir serliga fyri, hvat kann henda upp undir tað ætlaða valið.

– Í triðja heiminum hoyra val og harðskapur saman. Tá tað snýr seg um Irak, er torført at siga, hvat slag av harðskapi vit kunnu vænta okkum. Tað kann enda við borgarakríggi, men tað kann eisini enda við, at shiamuslimar og sunnimuslimar taka seg saman til eitt kríggj ímóti hersetingarvaldinum, sigur Ahmad Yusef Ahmad.

Hann er samdur við Mustafa Elwy Seif um, at shiamuslimarnir royna at halda seg í skinninum, tí teir vænta at fáa valdið í landinum, tá val verður. Men hesin friðurin er skroypiligur, sigur hann.

– Fáa shiamuslimarnir minstu kenslu av, at USA snýtir teir, verður tað útlendska hersetingarvaldið álopsmálið, sigur Ahmad Elwy Ahmad.



*Tað prutlar undir lokinum í Irak, og vandin fyri borgarakríggi veksur í hvørjum, siga arabiskir eygleiðarar*

ítróttur
Nr. 45 • fríggjadagur • 5. mars 2004 • 78. árgangur • www.sosialurin.fo

# Dómaramistak gav Neistanum fyrimun

**Á Skála iðra tey seg um, at tey ikki eru heilt frammi í oddinum í gullstríðnum í manshondbólti. Men støðan kundi kanska verið øðrvísi, var tað ikki fyri eitt dómaramistak í dystinum móti Neistanum herfyri**

HONDBÓLTSLÓGIR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

»Floytuljóðið frá tíðtakara/skrivara steðgar í prinsippinum dystinum og alt tað, sum hendir eftir hetta verður ógildað, tó undantikið persónligar revsingar. Tað vil siga, at gul kort, útvísingar v.m., sum verða givin í tíðarbilinum millum floytuljóðið og tekini frá dómarunum um at steðga dystinum, verður galdandi.«



*Eina løtu spurdist rættiligt rok burturúr, tá strandingar mettu dómararnar hava dømt skeivt, tá teir góðkendu málið hjá Neistanum til 29-27. Og nú eisini staðfest, at strandingar høvdu alla orsøk til at mótmæla avgerðini*
*Mynd: Álvur Haraldsen*

*Framhald á síðu 20*



**Oktan 95 bensin frá komandi viku**

*Nú flestu bensinriknu bilar kunnu koyra við oktan 95, fara vit frá komandi viku at selja hetta bensinið. Tí átti tú at kannað, um tín bilur kann koyra við oktan 95. Les um hetta í leiðbeiningarbókini til bilin, ella spyr teg fyri hjá bilumboðnum.*

*GG! Oktan 98 bensin verður framvegis at fáa á ávísum støðum.*

REPROZ

STATOIL